




# Einar Føroyar uttan braindrain



EYÐGUNN SAMUELSEN
Javnaðarflokkurin

Vit kenna trupuleikan, føroyska samfelagi manglar kvinnur, arbeiðsmegi og at útbúgvin fólk koma heimaftur at gagna føroyska samfelagnum. Spurningurin er so hvussu vit loysa henda trupuleikan og um tað eru politikarar, ið verðuliga vilja leggja orku í at venda hesi skeivu gongd.

Tað skulu fleiri ymiskar broytingar til fyri at venda gongdini. Ein avgerðandi táttur er ein miðvísur javnstøðupolitikkur, ið umfatar alt samfelagi frá “toppi til botn”.

**Miðvísan javnstøðupolitikk**

Javnstøða millum kyn skal innan 2015 verða ein sjálvsagdur tættur í føroyska samfelagnum. Hetta krevur, at ovasti politiski myndugleikin slóðar fyri at fremja javnstøðu.

Tí hevur Javnaðarflokkurin samtykt, at vit vilja krevja at ásetingin um javnstøðu eisini skal vera galdandi tá ið komandi landstýri verður skipað. Hetta kann gerast við at flokkarnir, ið skipa samgongu, skulu skjóta ein persón av hvørjum kyni til hvønn landsstýrissess, og verður tað uppgáva løgmans at tryggja javnstøðu, tá ið landsstýri endaliga verður skipað.

**Tað almenna**

Vit vilja arbeiða fyri einum samlaðum javnstøðupolitikki har Javnstøðulógin frá 1994 skal endurskoðast. Øll lógaruppskot ið verða løgd fram skulu greina ávirkanina á javnstøðu. Ein amboðskassi skal gerast ið inniheldur javnstøðutiltøk og kommununar skulu eisini við í arbeiði.

Tað almenna skal í sínum vali av nevndum og ráðum ganga á odda í at halda kynjaásetingar

**Privati arbeiðsmarknaðurin**

Privatar fyritøkur og nevndir skulu eggjast at fremja javnstøðu

Arbeiðsmarknaðarlóg skal gerast, sum tekur fyrilit fyri og eggjar javnstøðu

Ein samtáttanarætlan gerast fyri arbeiðsmarknaðin í samráði við partarnar á arbeiðsmarknaðinum

**Familjupolitikkur**

Foreldramyndugleiki skal vera felags og hædd skal takast fyri, at tað er barnið, sum hevur rætt til bæði foreldrini

Skipanin um barnsburðarfarloyvi skal broytast, so at bæði foreldur við lóg eru tryggjað barnsburðarfarloyvi

**Útbúgving og gransking**

Kannast skal, hví so nógvar ungar kvinnur flyta av landinum ella hví so nógvar kvinnur ikki vilja flyta aftur til Føroyar eftir at hava verið uttanlands í útbúgvingar- ella arbeiðsørindum. Hetta arbeiði skal gerast í samráð við javnstøðunevndina og KSF

Kynja hagtøl skulu gerast.Granskingarráðið skal fíggjað eina phd verkætlan um lønir í Føroyum. Undirvísingartilfar á øllum stigum skal taka hædd fyri javnstøðu

Fjølmiðlar skulu í sínum dagliga arbeiði leggja dent á at fremja javnstøðu

Javnstøða er meir enn at fáa somu løn fyri sama arbeiði ella at eins nógvir menn og kvinnur eru umboðað í løgtingi, landsstýri og aðrastaðni við. Javnstøða snýr seg m.a. um at fáa møguleikar t.d. til eina yrkisleið, at nema sær eina útbúgving, í politiska lívinum, í almenna rúminum, í frítíðini og í privata lívinum.

Javnaðarflokkurin vil tryggja, at javnstøða verður framd í verki.

# Vinn-vinn ella køv-køv



BJØRT SAMUELSEN
Tjóðveldi

So hendi tað. Prísurin fyri olju fór mikudagin upp um 100 dollarar fyri tunnuna.

Tað er tí sera umráðandi sum skjótast at savna allar kreftir – fiskivinnuna á sjógvi og landi, byggivinnuna, oljuvinnuna, Umhvørvisstovuna, Jarðfeingið, Fiskirannsóknarstovuna, politikarar, myndugleikar – ja øll, sum hava vitan og serfrøði á økinum. At taka nøkur seriøs “her og nú tøk” fyri gera okkara búskap til ein lágorkubúskap.

Okkara vinna er sera oljutung, og fiskivinnan hoknar longu undir høgu oljuprísunum. Hóast oljuprísurin er farin eitt kvink niðuraftur, so eru eingi útlit fyri, at oljan í framtíðini gerst bíligari – tvørturímóti.

Útlendskar stórfyritøkur, eisini fiskakeyparar, eru longu byrjaðar at spyrja eftir skjalprógvi um, at fiskurin er veiddur og framleiddur við so lágari og reinari orku, sum til ber, og hvussu nógv $CO_2$ er latið út í sambandi við vøruna (Sí grein á tjodveldi.fo/bjort: “Hvat náa vit uppá 2 minuttir?”).

**Skapa vinn-vinn støðu**

Búskapurin og umhvørvið er sostatt tvey sera tungtvigandi argument fyri at satsa í stórum uppá reinari og bíligari orku, umframt orkusparandi tøkni og tiltøk. Við at taka hetta í álvara kunnu vit skapa eina vinn-vinn støðu á báðum økjum, í staðin fyri at bæði vinna og umhvørvi køvast í høgum oljuprísum og dálking.

# Børn byggja land



JOHN JOHANNESSEN
Løgtingslimur, Javnaðarflokkurin

**Millum annað tí er tað, at vit fara at leingja barnsburðarfarloyvið upp til eitt ár við einari pápakvotu uppá tríggjar mánaðir, sum millum annað er við til at tryggja javnstøðu fyri kvinnur á arbeiðsmarknaðinum og fyri pápar í rættindum teirra saman við børnunum**

Tað er gott fyri eitt framkomið samfelagið, at nógv børn verða fødd. Í Føroyum føðir hvør kvinna í miðal umleið 2,5 børn. Hetta talið kalla vit burðartíttleika.

Fyri at fólkatalið kann vera í javnvág er neyðugt við einum burðartíttleika, sum er oman fyri tvey børn fyri hvørja kvinnu.

Men tað eru bara heilt fá long í vesturheiminum, ið uppfylla hesar treytir. Í Danmark er talið undir 2,0 og í til dømis Norðuritalia er talið bara 1,0. Vit hoyrdu eisini fyri kortum, hvussu myndugleikarnir í einum landsparti í Russlandi royndu at geva fólki frí fyri at gera børn og enntá virðisløn, um tað eydnaðist. Alt hetta fyri at halda burðartíttleikanum uppi og harvið tryggja framtíðina í landinum.

Lági burðartíttleikin hevur fingið nógv lond at ræðast eina eldrabylgju. At tað verða fleiri gomul fólk enn ung, og at nógvur peningur skal brúkast til sjúkrarøkt, pensjónir og ellisheim, meðan fá fólk eru til at gjalda skatt. Soleiðis hongur samfelagið jú saman. Vit skulu hava eina góða eldrarøkt, men tað ber bert til, um vit hava nóg nógvar ungar skattaborgarar at gjalda fyri hetta.

Í Føroyum verða vit spard fyri stórvegis trupulleikum á hesum øki, um vit syrgja fyri, at barnafamiljurnar hava tað gott. Vit skulu syrgja fyri, at ung í Føroyum tora at eiga børn og at hesi venda aftur til Føroya at búgva eftir lokna útbúgving. Tá skapa vit eitt sunt samfelag. Einar sunnar Føroyar fyri øll.

www.john.fo

# Tí koma fólk ikki heimaftur



ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK
Tjóðveldi

Stórsta hóttanin móti framburði í Føroyum í løtuni.er mangul uppá fólksligt tilfeingi. Tá vit ikki hava fólkavøkstur í eini tíð við hægsta búskaparliga hákonjunkturi nakrantíð, og í eini tíð har føroysku kvinnurnar føða flest børn í miðal í Evropa, so er okkurt heilt galið .

Eg ivist ikki í, at høvuðsorsøkirnar til fólksligu stagnatiónina eru tvinnar: vit raðfesta útbúgving og serliga gransking og lágt, og vit hava raðfest støðuna hjá einligum uppihaldarum ov lágt. Báðar hesar orsøkirnar raka bæði kynini, men serliga kvinnurnar, sum m.a. er orsøkin til at okkum mangla 2000 kvinnur í Føroyum.

Gamaní eru vit ein útjaðari í Evropa og eisini í Norðurlondum. Men tað eru tað ikki bara vit sum eru. Onnur útjaðaraøki t.d Tromsø og Akureyri sóu hóttanina við fólkafráflyting í góðarir tíð og gjørdu nakað við tað við hepnari hond. Akureyri er í dag eitt eftirtraktað niversitetsumhvørvi á altjóða støði og Tromsø tað sama. Hesi bæði økini eiga at verða dømi um, at ongin orsøk er at góðtaka stagnatión í fólkatalinum.

Hetta verður nakað av tí, sum Tjóðveldi vil arbeiða við, koma vit í samgongu!

# Tað fór mær kalt niður eftir rygginum



TORDUR J. NICLASEN
Miðflokkurin, listi H.

Kann tað passað? Óvirkin venjingarhylur á skúlanum á Trøðni í 3 ár??? Í 3 ár ?? Var eingin politikari sum stríddist fyri søk teirra, ið tørva venjingar í slíkum hyli?? Hava politikarar mist hjartað og samhuga við teim, ið hava serligan tørv??

Peningur manglar so ikki – í hesum tíðum, tá fjøll og tunlar verða sprongdir sum ongantíð fyrr!!

Nei, her má vend koma í!! Hjartalag og tað menniskjaliga má vera við í avgerðum, ið tiknar verða!

Eg bjóði meg fram aftur og vil stríðast fyri rættindum teirra, ið hava serligan tørv!